# Bint ein eingil



NÁM

Skeið í handarbeiði 2019 Sára Mrdalo og Tóra Joensen

**Gott at duga, áðrenn tú fert í gongd:** At kasta uppá. At binda stiklavond. Binda slætt.

**Tá tú hevur bundið eingilin dugir tú at:**

- kasta uppá
- binda stiklavond
- binda slætt
- binda eitt hol
- læsa av
- festa endar

**At festa endar:** At seyma nakrar stingir aftureftir, fyri at tað seymaða ikki fer uppaftur.

**Tilfar:**

2 stokkar nr. 3

Navia Duo hvítt

3 pípureinsarar gull-littir

Eitt flaminguhøvd 20 mm

Gult loðið tógv

NÁM

**Arbeiðsgongd:**

1. Kasta 12 eygu uppá og bint 20 umfør stiklavond = 10 rillur.



2. Síðan verða 5 eygu kasta uppá á báðum síðum. Tað vil siga at vit gera likkjur sum á myndini niðanfyri, fyrst á eini síðu.



NÁM

Skeið í handarbeiði 2019 Sára Mrdalo og Tóra Joensen



Síðan binda vit yvir á hina síðuna og kasta 5 eygu uppá. Nú eru 22 eygu á stokkinum.



3. Bint síðan 10 umfør yvir øll eyguni = 5 rillur.



4. Nú verður eitt hol bundið til háls mitt í umfarinum soleiðis: Bint 10 eygu, bint síðan 2 eygu saman soleiðis: Sting stokkin undir tvey eygu og bint tey saman.



Kasta síðan um soleiðis: Legg tráðin framman fyri og bint eitt eyga.



Bint umfarið liðugt. Halt áfram at binda aftur og fram til tað eru 5 rillur frá holinum.



5.Nú fara vit at læsa 5 eygu av á báðum síðum soleiðis: Bint 1 eyga, bint 1 eyga afturat. Flyt tað fyrra eygað uppum, nú er 1 eyga læst av. Halt áfram til 5 eygu eru læst av, bint umfarið liðugt. Byrja næsta umfar við at læsa 5 eygu av. Nú eru 12 eygu á stokkinum.



Bint 20 umfør stiklavond aftur og fram = 10 rillur. Læs øll eyguni av.



6.Nú verður eingilin seymaður saman soleiðis: Boygg tað bundna stykkið í helvt.



Seyma við smáum stingum fram við síðunum og undir ermuni. Fest endarnar.

NÁM





Síðan verður høvdið bundið soleiðis:

7. Kasta 16 eygu uppá stokk nr. 3 og bint 12 umfør slætt.

At binda slætt: 1. umfar rætt,  2. umfar rangt.

Læs eyguni av.



NÁM

Skeið í handarbeiði 2019 Sára Mrdalo og Tóra Joensen

8. Nú verður stykkið seyma saman og høvdið latið í soleiðis: Tráða eina stoppinál og sting hana gjøgnum ovara kant av stykkinum, sí mynd.





Stramma í tógvið, so at ovari kantur kemur saman.

9. Vend stykkinum soleiðis at rangan vendir út. Seyma síðurnar saman við smáum stingum og lat tað vera opið niðast.

NÁM



Vend stykkið á rættuna.



10. Nú verður høvdið latið í.



11. Nú verður høvdið og kroppurin sett saman soleiðis: Sting pípureinsarin gjøgnum ermuna. Tak umleið 1 cm av pípureinsarinum upp gjøgnum hálsin (dupultur).



Set høvdið oman á pípureinsaran. Seyma runt um niðara kant av høvdinum, soleiðis at tað kemur saman í niðara kanti.



Seyma síðan høvdið fast á kroppin við smáum stingum runt um hálsin.



12. Boyggj pípureinsaran inn í ermarna og lat umleið ½ cm stinga úr ermuni.



13. Nú fer eingilin at fáa hár. Klipp umleið 20 træðrir á 20 cm av gulum tógvi.



14. Legg træðrirnar i helvt og seym við gulum tógvið hárið mitt á hvødið.



15. Klipp hárið javnt og bind ein hala aftanfyri.



16. Evna ein pípureinsara sum “eitt hjarta” til veingir.



17. Seyma pípureinsaran á ryggin og legg hárið uttaná.



18. Evna pípureinsaran til eina gloriu og klipp pípureinsaran um 3 cm. Sting pípureinsaran niður í hárið, so glorian situr føst.

